## Munkar fáa ordrar um fótbólt

Teir 40.000 buddistisku munkarnir í Kambodia hava nú fingið greið boð um, hvussu teir skulu bera seg at í hesum døgum, tá ið áhugin fyri HM-fótbólti er so stórur. Andaligi leiðarin hjá teimum, Non Nget, hevur sagt, at teir kunnu hyggja eftir fótbólti, men teir mugu ikki heppa á liðini. Munkarnir skulu ikki hyggja eftir fótbólti alment, og teir mugu fyri alt í verðini ikki tippa dystirnar í HM-kappingini. Um munkarnir rópa undir dystunum, verða teir útihýstir frá munkaordanum.



## Brøndby gjørdist meistari – hjá kvinnum

Í gjár var seinasta leikumfar í donsku kvinnukappingini í fótbólti. Brøndby lá best fyri undan seinastu dystunum, og tað eydnaðist eisini liðnum at vinna meistaraheitið. Brøndby spældi ímóti OB og vann heili 7-1. Harvið kundi Fortuna Hjørring einki gera við Brøndby á fremsta plássinum, og kvinnuliðið úr danska høvuðsstaðnum fekk gullmerkini hongd um hálsin. Hetta er fjórða árið á rað, at Brøndby vinnur donsku kvinnukappingina. Skovlunde endaði sum nummar trý og fekk bronsumerkini.

# Robben er ov sjálvsøkin

**Arjen Robben var stóri spælarin á hollendska landsliðnum, sum vann ímóti Serbia & Montenegro, men liðfelagið er í øðini, tí hann heldur, at Robben er alt ov sjálvsøkin á vøllinum**

HM BÓLKUR C
*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*

Chelsea-spælarin Arjen Robben var heiðraður sum besti maður, tá ið Holland í gjár vann fyrsta dystin í HM-endaspælinum. Robben skoraði einasta málið ímóti Serbia & Montenegro, men hann vísti fleiri ferðir, at hann er ein framúr góður spælari.

Tað eru tó ikki øll, sum eru so fegin um spælið hjá Robben. Arsenal-spælarin Robin van Persie, sum spælir høgri vongur hjá Hollandi, er í øðini um spælistílin hjá Robben, sum hann kallar alt ov sjálvsøknan.

– Hann má taka fyrilit fyri sínum liðfeløgunum. Við hvørt spælir hann meira fyri seg sjálvan enn fyri liðið, sigur Robin van Persie.

Landsliðsvenjarin Marco van Basten er greiður yvir, at tað er ikki javnvág á hansara liði.

– Okkara spæl gekk mest fyri seg í vinstru síðu, tí Robben er so væl fyri, og tað gjørdi tað trupult hjá Persie í hinari síðuni, sigur landsliðsvenjarin. Robben sjálvur tvíheldur um, at hann spælir fyri liðið og ikki seg sjálvan.

### Argentina knógvaði Fílabeinsstrondini

Argentina verður roknað sum eitt av sterkastu londunum í HM-endaspælinum, men suðuramerikanska liðið hevði stórar trupulleikar av sterka liðnum hjá Fílabeinsstrondini í dystinum leygarkvøldið.

Fílabeinsstrondin er kanska sterkasta liðið úr Afrika, og tað góvu teir eisini eina ábending um leygarkvøldið. Argentina fekk tvey mál og vann dystin, men Fílabeinsstrondini trýsti nógv og skoraðu eitt mál.

Harvið komu Holland og Argentina best frá byrjan í bólki C, sum av mongum verður roknaður sum sterkasti bólkurin í endaspælinum.

# Portugal má spæla betur

**Málskjúttin hjá Portugal í sigrinum á Angola heldur, at liðið má betra sítt spæl, um tað skal koma langt í HM-endaspælinum. Mexico vann pliktsigur á Iran**

HM BÓLKUR D
*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*

Portugal gjørdi einasta málið, um kom í dystinum ímóti Angola sunnukvøldið. Portugal var favorittur til at vinna dystin, men tað var eingin sannførandi sigur, hóast Portugal var betra liðið á vøllinum.

Hetta ásannaði málskjúttin Pauleta eisini eftir dystin.

– Fyrsti dysturin er altíð trupul, men vit fingu trý stig, og tað hevur størstan týdning. Vit skulu betra spælið hjá okkum, um vit skulu koma langt í hesi kappingini. Vit mugu veruliga spæla betur enn í kvøld, segði Pauleta eftir dystin.

Luis Figo, sum er liðformaður hjá Portugal, var kosin til besta spælaran í dystinum, meðan Cristiano Ronaldo, sum veðrur roknaður sum størsta vónin hjá Portugal, varð skiftur út eftir eitt misjavnt avrik.

Hin dysturin í bólki D var ímillum Mexico og Iran, og her vann Mexico 3-1. Roknað varð eisini við frammanundan, at Mexico skuldi vinna dystin, og hóast Iran fór til hálvleik við javnleiki, so gjørdi Mexico sína skyldu í seinna hálvleiki og skoraði tvey mál.

Venjarin hjá Mexico var ikki nøgdur við sínar spælarar eftir fyrra hálvleik, og í hálvleikssteðginum skifti hann tríggjar spælarar út.

Stóri spælarin í dystinum var Omar Bravo, sum skoraði tvey av málunum hjá Mexico.

## HM – endaspælið

| Bólkur A | d | v | - | j | - | t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 Týskland | 1 | 1 | - | 0 | - | 0 | 4 | 2 | 2 | 3 |
| 2 Ecuador | 1 | 1 | - | 0 | - | 0 | 2 | 0 | 2 | 3 |
| 3 Costa Rica | 1 | 0 | - | 0 | - | 1 | 2 | 4 | -2 | 0 |
| 4 Póland | 1 | 0 | - | 0 | - | 1 | 0 | 2 | -2 | 0 |

| Bólkur B | d | v | - | j | - | t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 Ongland | 1 | 1 | - | 0 | - | 0 | 1 | 0 | 1 | 3 |
| 2 Svøríki | 1 | 0 | - | 1 | - | 0 | 0 | 0 | 0 | 1 |
| 3 Trinidad & Tobago | 1 | 0 | - | 1 | - | 0 | 0 | 0 | 0 | 1 |
| 4 Paraguay | 1 | 0 | - | 0 | - | 1 | 0 | 1 | -1 | 0 |

| Bólkur C | d | v | - | j | - | t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 Argentina | 1 | 1 | - | 0 | - | 0 | 2 | 1 | 1 | 3 |
| 2 Holland | 1 | 1 | - | 0 | - | 0 | 1 | 0 | 1 | 3 |
| 3 Fílabeinsstrondin | 1 | 0 | - | 0 | - | 1 | 1 | 2 | -1 | 0 |
| 4 Serbia & Montenegro | 1 | 0 | - | 0 | - | 1 | 0 | 1 | -1 | 0 |

| Bólkur D | d | v | - | j | - | t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 Mexico | 1 | 1 | - | 0 | - | 0 | 3 | 1 | 2 | 3 |
| 2 Portugal | 1 | 1 | - | 0 | - | 0 | 1 | 0 | 1 | 3 |
| 3 Angola | 1 | 0 | - | 0 | - | 1 | 0 | 1 | -1 | 0 |
| 4 Iran | 1 | 0 | - | 0 | - | 1 | 1 | 3 | -2 | 0 |

## HM-dystir

**BÓLKUR A**
**Týskland-Costa Rica 4-2 (2-1)**
1-0: Philip Lahm, 6.
1-1: Paulo Wanchope, 12.
2-1: Miroslav Klose, 17.
3-1: Miroslav Klose, 61.
3-2: Paulo Wanchope, 73.
4-2: Thomas Hitzisperger, 87.

**Póland-Ecuador 0-2 (0-1)**
0-1: Carlos Tenorio, 24.
0-2: Agostin Delgado, 80.

**BÓLKUR B**
**Ongland-Paraguay 1-0 (1-0)**
1-0: sjálvmál, 3.

**Trinidad & Tobago-Svøríki 0-0**

**BÓLKUR C**
**Argentina-Fílabeinsstrondin 2-1 (2-0)**
1-0: Hernan Crespo. 24.
2-0: Javier Saviola, 38.
2-1: :Didier Drogba, 82.

**Serbia & Montenegro-Holland 0-1 (0-1)**
0-1: Arjen Robben, 18

**BÓLKUR D**
**Mexico-Iran 3-1 (1-1)**
1-0: Omar Bravo, 28.
1-1: Yahya Golmohammadi, 36.
2-1: Omar Bravo
3-1: Antonio Zinha

**Angola-Portugal 0-1 (0-1)**
0-1: Pedro Pauleta, 4.


# FINNIÐ BÓLTIN

Saman við Atlantic Airways lutar Sosialurin í ár ikki færri enn 13 flogferðaseðlar á rutunetinum hjá Atlantic. Ein vinnari verður hvørt umfarið í Formula-deildini

Møguleikarnir fyri flogferðum úr Føroyum hava ongan tíð verið so stórir, sum teir verða tað í ár. Við fimm flogførum í støðugari flúgving eigur Atlantic Airways sín stóra lut í øktu valmøguleikunum, og nú kanst tú saman við Sosialinum og Atlantic verða partur í nøkrum av mongu fráferðunum.

Eftir hvørt umfarið í Formula-deildini verður ein mynd at síggja her í blaðnum, har vit hava »sletta« bóltin úr myndini. Uppgávan hjá lesaranum er so at gita, hvar hesin bólturin eigur at vera.

Við at senda SMS-boð á 1441 ber til hjá lesarunum at vera við í kappingini, har Atlantic Airways hevur eina flogferð tøka eftir annaðhvørt av teimum 27 umførunum í Formula-deildini.

Heldur tú, at bólturin er í teigi 1, skal teksturin í SMS-boðnum vera »hvar 1«. Soleiðis skal hvørt boðið bara innihalda orðið »hvar« og so nummarið á teiginum, har tú heldur bóltin eigur at vera.

*Kostnaðurin fyri at senda boðini er 5 krónur umframt vanligan SMS-takst.*






ATLANTIC AIRWAYS

*Hvar er bólturin?*
Hvar heldur tú, at bólturin er? Við at senda eini SMS-boð til 1441 kanst tú vera við í lutakastinum um eina ferð á rutunetinum hjá Atlantic Airways. Skrivað hvar og so nummarið á teiginum, har tú heldur bóltin vera.